



*Eisini tey smáu hátíðarhildu dagin*

*Tá ið Hovstunnilin varð tikin í brúk, varð eisini skipað so fyri, at fólk kundi renna, súkkla ella ganga ígjøgnum tunnilin. Hesi bæði vóru tey fyrstu at renna ígøjgnum Hovstunnilin. Frá vinstru er tað Jon Katkjær, sum var fyrstur á mál av mannfólkunum og Marin í Dali, ið var fyrsta konufólkið á mál*


*Á móttøkuni í Øravík var rættiliga nógv fólk*




# Vit skulu ikki stúra fyri stórum íløgum

**Hovstunnilin er dýrur, men hann var neyðugur og vit eiga ikki at vera nøgd við støðuna, sum hon er nú, segði Bjarni Djurholm á samkomu leygardagin, eftir at Hovstunnilin var latin upp**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú hava suðuroyingar loksins fingið tað vegasamband, sum tað so leingi hevur verið tørvur á.

Eisini Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fegnaðist um úrslitið, tá ið Hovstunnilin varð tikin í brúk leygardagin.

Hann vísti á, at gamli Hovsvegurin er tað vegastrekkið í landinum, har eina mest ferðsluóhapp eru hend eftir bilatalinum.

- Nýggja vegasambandið fer væntandi at fáa ferðsluóhappini at fækka, eins og tað fer at minka um orkunýtsluna og gera umstøðurnar hjá teimum ferðandi í Suðuroy høgligari.

Hann helt, at hetta er ein stór íløga, men eftir hansara tykki er hon neyðug, ikki minst fyri at bøta um umstøðurnar hjá vinnulívinum í Suðuroy.

– Hetta er eitt stórt tak, har vit hava megnað at flutt Føroyar og Suðuroy longur fram á leið ímóti eini bjartari framtíð hjá okkara børnum og ommu-og abbabørnum.

– Men vit eiga ikki at steðga her, tí vit eiga alsamt at stremba eftir, at gera íløgur, sum gera okkum ríkari. Vit skulu ikki vera bangin fyri at gera stórar íløgur, tá ið tær eru skilagóðar og so at vit kunnu avlevera okkara børnum og ommu-og abbabørnum einar Føroyar við størri møguleikum.

Bjarni Djurholm vísti eisini á, at í Suðuroy er tað eisini harðliga tiltrongt at gera nýggjan Hvalbiartunnnil.

Og hann helt, at tá ið tunnilin norður um fjall í Borðoy er gjørdur, eigur Hvalbiartunnilin at vera fyrsta verkætlanin, sum farið verður undir.

Bjarni Djurholm vónaði, at nýggi Hovstunnilin fer at gera samskiftið ímillum syðru og norðaru helvt í Suðuroy líka gott sum vegasambandið er.




**Sosialurin í morgin**

## Eg havi ongantíð verið bangin

Í Sosialinum í morgin hitta vit eina suðuroyarkvinnu, ið er serliga fegin um at Hovstunnilin nú er liðugur. Tað eru fáir suðuroyingar, ið hava koyrt so leingi um Hovsegg til og frá arbeiði, sum hon. Hon hevur havt nógvar ógvuliga ringar túrar, eisini seint á kvøldi og um næturnar, tá ið næstan ongin onnur ferðsla var, so at hon var mestsum einsamøll langt uppi í fjøllunum í stormi, kavaroki og mjørka. Men hon hevur havt góðar nervar, tí hon sigur, at hon hevur ongantíð verið bangin. Bara einaferð er hon setst aftur fyri veður, men eina jólaaftan mátti hon venda aftur á veg til hús